skeivt at skipini skuldu verða negld/nittað. Hansara royndir vóru, at pláturnar skuldu sveisast saman fyri at kunna halda betri. Men hetta verður avvíst av fleiri serfrøðingum.

Kjærbøl fer frá sum ráðharri við eini stjórnarumskipan í 1957 og verður avloysur av Kai Lindberg. Men Kjærbøl roknaði framvegis Hans Hedtoft sum krúnan á sínum verki sum ráðharri fyri Grønland.

## Kona skiparan var trygg

Hans Hedtoft verður sjósettur 13. august 1958. Konan skiparan Ellen Rasmussen er fegin um trygdartiltøkini á nýggja skipinum. Nú kann hon róliga senda mannin avstað!

Tann 7. januar er klárt hjá Hans Hedtoft at fara sín fyrsta túr úr Keypmannahavn. Alt verður gjørt fyri at ferðaætlanin skal haldast. Komið verður til Godthåb tann 17. januar, eitt samdøgur áðrenn ætlað, og tað verða hildnar veitslur og móttøkur í býunum, har tað verður lagt at.

Okkurt ófrættakent var kortini. Fyristøðumaðurin fyri ein eftirskúla Halfdan Egeskjold skuldu saman við konuni fara aftur til Danmarkar. Tey siga farvæl við sínar gomlu næmingar. Ein av teimum Ruth Holm hevði droymt, at skipið als ikki fór at koma vegin fram til Danmarkar. Hon fekk enntá sannført onkran vin at fara við Umanak í staðin fyri við Hans Hedtoft. Tá skipið leggur frá kaj sær Ruth eina sjón. Reyði skrokkurin fær ein deyðiligan svartan lit!

Fyribils gongur tó alt sum tað skal.

## Gongdin vanlukkudagin

Men tann 30. hendir vanlukkan. Tað einasta ein veit við vissu er tað samskifti, sum kann staðfestast. Tað var fylgjandi, tíðirnar eru GMT:

16.56. Fyrsta neyðarkall hoyrist

17.14. Grønlands Kommando fær boð um samanstoyt við ísfjall

17.18. Trolarin Stadt Herten hoyrir SOS frá Hans Hedtoft

17.25. Stadt Herten boðar frá, at Johannes Krüss er nærmasta skip, 25 fjórðingar burtur

18.04. Johannes Krüss boðar frá, at teir eru á veg at hjálpa

18.12. Hans Hedtoft boðar frá, at skipið søkkur spakuliga

18.15. Johannes Krüss boðar frá, at teir sigla 10 míl, men líkindini eru vánalig. Skipini royna peila hvønn annan

19.40. Johannes Krüss biður Hans Hedtoft senda neyðrakettir. Men teir á Johannes Krüss síggja einki

20.16. Hans Hedtoft boðar frá, at teir ikki hava nakað ljós umborð

20.21. Johannes Krüss spyr, um teir á Hans Hedtoft síggja teirra ljóskastara. Men á Hans Hedtoft sæst einki.

20.30. Johannes Krüss er á positiónini, har Hans Hedtoft hevur boðað frá samanstoyti við ísfjallið.

Sýnið er ringt, og einki sæst. Tað kann skoytast uppí, at ivi hevur verið um, hvørt positiónin kann hava verið misskilt.

20.41. Hans Hedtoft boðar frá, at teir søkka spakuliga.

Hetta var seinasta rættuliga samband millum Hans Hedtoft og Johannes Krüss.

21.06. Hoyrir Johannes Krüss veik morsisignal

21.45. Prins Christiansund fær seinastu boðini frá Hans Hedtoft: "Vit søkka spakuliga. Okkum tørvar hjálp beinanvegin." Síðan er tøgn.

## Segði grønlandsmálaráðharrin ósatt?

Tað verður leitað víða um, men tað verður ikki funnið tað minsta sindur, sum kann sigast við vissu at vera frá Hans Hedtoft. Einasta spor er ein bjargingarkransur, sum seinni verður funnin í Íslandi.

Sjokkið í Danmark er sjálvsagt ræðuligt. Men skjótt verður farið at grava í tí, sum er hent frammanundan, nevniliga við teimum báðum skiparayvirlýsingunum.

Tann fyrsti, sum tekur hetta upp, er sami blaðstjórin á Grønlandsposten, sum varð hóttur at tiga um málið í samband við Umanak í 1957.

Ein annar, sum loftar málinum um skiparayvirlýsingarnar, er grønlandstíðindamaðurin hjá Politiken, Johannes Lindskov Hansen.

Hann plagdi eisini at skriva um Føroyar. Havi sjálvur nógv samband við dóttir hansara Dorte. Hon minnist enn til, hvussu hart hetta mál tók pápanum, og at hann tosaði nógv um tað heima.

Í fyrsta umfari fær Lindskov Hansen tey ráð frá hægsta stað at tiga. Men hetta ber als ikki til.

Tann stóri spurningurin gjørdist, um fyrrverandi grønlandsmálaráðharrin Johannes Kjærbøl visti um ta fyrru yvirlýsingina, sum mælti frá allari ferðamannasigling til Grønlands á vetri.

Hóast hart kroystur avnoktaði hann avgjørt til ta síðsta, at hann kendi hana. Hann segði seg bert kenna til ta seinnu fráboðanina, sum við fyrivarnum góðtók eina slíka sigling.

Hetta legði eisini hart trýst á hansara embætismenn, serliga stjóran á KGH, sum harvið vórðu lagdir undir ikki at hava givið ráðharranum greið boð um alt, sum var farið fram. Hetta verður mett sum ósannlíkt.

## "Guds vilji"

Samstundis verður tosað um ábyrgdina av tí, sum er hent. Men hana er eingin sum vil átaka sær. Her er talan um lagnu og "an act of God", sum einki menniskja kann hava gjørt nakað við.

Sjóforhoyr var hildið 12. februar. Har vórðu nógv skjøl løgd fram, men her var heldur ikki staðfest nøkur ábyrgd.

Kjærbøl kendi seg tó ikki tryggan. Hann væntaði, at onkur skuldi gerast syndabukkur, og har var hann ein upplagdur kandidatur. Hann merkti eisini, hvussu fólk hildu seg frá honum.

Ein dómarakanning verður sett í verk 17. februar. Hon kemur við eini drúgvari frágreiðing, har niðurstøðurnar tó eru veikt orðaðar.

Eitt punkt var um plaseringina av bjargingarbátunum, sum var sera óhøglig. Bátarnir skuldu lyftast upp og niður fyri at fáast á sjógv. Men hetta hevði kanska ikki gjørt tann stóra munin í hesum førinum.

Samstundis verður sett eitt sokallað Besejlingsudvalg, sum skuldi kanna øll viðurskifti um sigling uppá Grønland. Formaður var varaadmiralurin Aage Vedel, sum var giftur við Kirsten, systir Valdemar Lützen. Ættin í Føroyum plagdi at kalla hann "onkel Aage."

## Ríkisrættarmál

Hetta førir til spurningin um ríkisrættarsakarmál móti Kjærbøl. Tann fyrsti sum reisir hetta sum mál er Aksel Larsen, sum tá umboðaði SF á fólkatingi. Tað hendir dagin eftir, at dómarafrágreiðingin verður kunngjørd.

Hetta verður í fyrsta umfari avvíst. Aksel Larsen var sum gamal kommunistur heldur ikki nakað "gott papír".

Men tann 2. september kemur frágreiðingin frá Besejlingsudvalget. Her verður funnist harðliga at viðurskiftunum hjá teimum sum sigla uppá Grønland. Førd verða sjónarmið, sum svara væl til fyrru skiparafráboðanina. Her var eisini funnist at rutini hjá Hans Hedtoft, sum var tann skjótasta, men ikki tann vandaminsta leiðin.

Nevndin staðfestur ikki nakra beinleiðis ábyrgd. Men við ti sum kemur fram er eingin ivi um, at Johannes Kjærbøl er skurkurin. Hann hevur upplagt dult fyrru skiparayvirlýsingina fyri fólkatinginum, tá ið hann svaraði fyrr umrødda fyrispurning.



*Richard giftist í 1956 við Emmy f. Stenberg. Tey vóru bæði úr Sandvík. Myndin er frá dópinum av eldri dótrini Mariann f. 13.3.1957. Richard hevði siglt við føroyskum skipum, t.d. við Norðfarinum í Grønlandi, áðrenn hann fór á navigatiónsskúla. Fyrstu árini sigldi hann við DFDS men fór so í 1958 við Disko hjá KGH. Hann roknaði tað sum eina serliga viðurkenning at verða biðin við Hans Hedtoft. Emmy giftist seinni við Harry Johansen í Havn, og tey fingu eina dóttir. Emmy og Richard búðu í Gentofte. Hon varð uppringd av KGH, sum segði henni, at Hans Hedtoft hevði sent neyðarkall. So var at lurta eftir útvarpi. Tað var framvegis vónað, so leingi sum tað frættist, at Johannes Krüss var á veg til hjálpar. Men henda vónin var stokkut*



*Faðirleysu systrarnar Mariann og Rikka. Rikka var fødd 4. august 1958. Hon varð doypt Beinta 4. januar 1959, sum pápin fór avstað við Hans Hedtoft tann 7. januar. Emmy vildi fegin seinni, at gentan kom at eita eftir pápanum, og hon fekk loyvi til at kalla hana Rikka*

Tann 28. oktober 1959 setur Erik Ninn Hansen vegna borgarligu andstøðuna fram eitt annað uppskot um ríkisrættarmál móti Kjærbøl.

Uppskotini bæði koma til 1. viðgerð 9. desember. Málið fer í nevnd. Poltikkur er politikkur. Men alt hetta endar kortini við, at uppskotið um ríkisrættarsak verður felt í fólkatinginum.

Beinleiðis úrslitið av hesum var kortini, at tá varð gjørd ein ráðharraábyrgdarlóg. Lagnunar speisemi var, at júst Ninn Hansen var fyrsti ráðharrin, sum varð dømdur eftir hesi lóg nógv ár seinni, nevniliga í tamilmálinum!

Annað úrslit gjørdist tó ein betri ís- veður- og bjargingartænasta í Grønlandi. Hetta forðaði tó ikki fyri, at danska farmaskipið Hanne S hvarv í sama øki 30. april 1960. Her var eisini ein føroyingur við, nevniliga Tummas Zachariassen úr Streymnesi.

## Óla Hendrik var á manningarlistanum

Óla Hendrik av Fløtum, ættaður úr Fuglafirði, sigldi í fleiri